# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



6. desember fingu Miriam T. Jacobsen og Leivur B. Ejdesgaard, Kvívík, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4050 gr.



Systkinnabørnini Súsanna Fríða og Hans Oluf hava fingið hvør sína lítlusystir. Foreldrini hjá Súsannu Fríðu eita Petra og Andrias og foreldrini hjá Hans Oluf eita Ragnhild og John

5. desember fingu Dania Eyðunsson og Petur Joensen, Vágur, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3200 gr.

10. desember fingu Signar og Eyðdis Skaalum, Trongisvágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3670 gr.

12. desember fingu Poul Eli Bærendsen og Kristel Dam,Vágur, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3280 gr.

12. desember fingu Petra Olsen og Andrias Jensen, Sandavágur, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3150 gr.

13. desember fingu Hansina Würdig Djurhuus og Dánjal á Neystabø, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4070 gr.

13. desember fingu Jannet Haraldsen og Kjartan Olsen, Sandavágur, ein dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3950 gr.

14. desember fingu Ragnhild Olsen og John Johannessen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3750 gr.

15. desember fingu Jóngerð Veyhe, Porkeri og Ronni Dalá, Vágur, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 2700 gr.

15. decembur fingu Stine Dobak Jensen og Tummas Planck, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon viga›i 4.000 g. og var 55 cm. long.

17. desember fingu Jenny Hansen og Torleif Hansen, Skálafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3600 gr

18. desember fingu Mary-Ann og Høgni Bech, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3950 gr.

### Prógv

Tann 21. desembur fekk Bárður Johannesen handað prógv í Byggifrøði á altjóðari linju við Københavns Erhvervs Akademi. Útbúgvingin ber enska heitið: Constructing Architecture, og hon tekur 3 1/2 ár. Bárður er sonur Daniu og Petur Hans Johannesen, og er uppvaksin á Argjum.

Óli Gaard, Klaksvík, hevur tann 20/12-06 fingið prógv sum Góðkendur El-installatør á Keypmannahavnar Maskinmeistara- og El-installatørskúla.

15. des. í ár hevur Marita Sundstein Carlsson (Jóanesarson) lokið prógv sum cand.scient í lívfrøði og evnafrøði á Syddansk Universitet í Odense.

# Torleif Sigurðsson 60 ár

Í morgin, leygardagin 23. desember ella tollaksmessudag, verður Torleif Sigurðsson í Klaksvík 60 ár. Torleif er kendur sum eitt nú formaður í FSF, vinnulívsmaður og kommunalpolitikari.



Torleif er klaksvíkingur og uppvaksin á Stongunum. Mamman var Margretha fødd Poulsen og ættað av Eiði. Pápi hennara, Hans Jacob Poulsen, var fyrsti javnaðartingmaður í Eysturoy. Hann varð valdur inn á ting í 1936, men hann doyði longu í 1937.

Pápin var Sigurð Sigurðsson av Húsum. Abbin, Jóin á Húsum, var føddur í Vestmannaoyggjunum, og foreldrini vóru úr Mýrdalsvík. Tá ið Jóin var sjey ára gamal, kom hann við Geila Jákupi til Húsar, har hann vaks upp, giftist og bygdi. Um 1930 fluttu tey til Klaksvíkar, og harvið kom Sigurðsson eftirnavnið til Klaksvíkar.

Sigurð doyði longu í 1960, og Margretha doyði í 2000.

Margretha og Sigurð fingu átta børn: Jóin (1940), Hans Jacob (1941), Alfons (1943), Torleif (1946), Thorbjørg (1949), John Tórur (1950), Terji (1956) og Hallstein (1959). Jóin býr í Svínáum, Hans Jacob í Holbæk, Thorbjørg í Häsleholm í Svøríki, John Tórur í Saltangará, Terji og Hallstein í Havn, og Alfons og Torleif búgva í Klaksvík.

Longu meðan Torleif gekk í realskúla, arbeiddi hann í keypssamtøkuni, sum tá helt til í hølunum hjá Jóan Jacob Jacobsen á Stongunum. Torleif tók skjótt við ábyrgd. Hann lærdi og arbeiddi hjá FDB í Danmark, eitt stutt skifti var hann í Havnini, og frá 1968, tá ið hann var 21 ára gamal, og inntil í ár 2000, var Torleif deildarleiðari í Føroya Keypssamtøku í Klaksvík.

Tá ið hann fór úr starvinum, hevði Torleif verið eitt skifti í farloyvi. Saman við bróðrinum, Alfonsi, átti hann útróðrarbátin Fuglberg. So keypti hann línuskipið Pison, seinni saman við øðrum línuskipið Kvikk og saman við øðrum útróðrarbátin Fiskimúla. Harafturat hevur hann verið útgerðarmaður hjá uppaftur øðrum bátum og skipum. Torleif hevur í vinnulívshøpi røkt fleiri álitissessir. Eitt nú hevur hann verið formaður í felagnum Línuskip.

Síðani 1993 hevur Torleif umboðað Javnaðarflokkin í Klaksvíkar býráð. Býráðssessurin hevur borið ymsar aðrar álitissessir við sær. Eitt nú er Torleif nevndarlimur í SEV. Torleif hevur fleiri ferðir verið á javnaðarlistanum til løgtingsval, og onkra ferðina hevur hann loyst av í tinginum.

Í 1981 varð Torleif valdur til formann í Fótbóltssamband Føroya. Hann loysti vinmannin, Christian Olsen, sála, av. Torleif var formaður í FSF inntil á aðalfundinum í 2002, tá ið hann bar seg undan afturvali. Í formanstíðini hjá Torleifi var føroyskur fótbóltur fyri stórum framburði. Størsta sigurin mundi Torleif kenna tað at vera, tá ið tað í 1988 eydnaðist at vinna FSF limaskap í altjóða fótbóltssamgonguni FIFA og árið eftir í europeisku fótbóltssamgonguni UEFA. Hvørjar møguleikar hetta hevur borið við sær fyri FSF og føroysku fótbóltsfeløgini er øllum kent.

Torleif er hóvligur, róligur og gløggur, og hesir eginleikarnir vóru sjálvandi týdningarmiklir, tá ið samráðst var um altjóða fótbóltslimaskapin.

Torleif Sigurðsson giftist í 1970 Elsu Mariu Mikkelsen, sum er ættað úr Árnafirði. Tey bygdu á Kósini og fingu fýra børn: Steindor (1968) doyði av ferðsluvanlukku á sumri í 1990. Sofía (1971), Margretha (1971) og Erna (1978). Tær búgva allar í Klaksvík. Torleif eigur sjey abbabørn: Jákup, Elsa Maria, Torleif, Steintóra, Rói, Bjørt og Ann.

Sum nógvir aðrir dreingir í Klaksvík, so var Torleif skóti í Skótaliði Nólsoyar Páls. Hann plagar ofta at taka til altjóða skótaleguna, sum hann saman við fleiri øðrum føroyskum skótum var á í Grikkalandi fyrst í seksti árunum. Eitt nú plagar hann at siga frá, at teir heilsaðu upp á Konstantin kong, og at tað var merkisvert, tá ið teir í toki koyrdu heim aftur gjøgnum Skopjé, sum orsaka av jarðskjálvta ikki var at kenna aftur frá tí, sum teir á veg eftir Balkan høvdu sæð, tá ið teir vóru á veg til Grikkalands.

Torleif spældi ongantíð fótbólt. Ítróttarligu kappabrøgdini legði hann í kappróðurin. Hann var bátsformaður á nýggja Klaksvíkingi í 1970. Hetta árið vunnu teir tríggjar róðrar. Í 1972 varð Torleif formaður í róðrardeildini hjá ÍSF. Hesa uppgávuna røkti hann í trý ár.

60 ára føðingardagin heldur Torleif saman við familjuni.

Vit ynskja babba hjartaliga tillukku við degnum og takka honum og mammu fyri, at tey eru so góð við okkum øll.

**Døtrarnar við familju**

# Bíðaðu eftir jólamonnum



*Hesa myndina tók myndamaður okkara yviri við Strond mikudagin, tá fýra gentur við hvør sínum rossi bíðaðu eftir jólamonnum í samband við okkurt jólatiltak í býnum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*